Nr. 18/2019

Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um innkomuvegin til Havnar, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin viðvíkjandi innkomuvegnum til Havnar?
2. Eru tingingar millum land og kommunu um málið, og um so er, hvør er tíðarkarmurin?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at seta pening av til innkomuvegin á komandi fíggjarlóg?
4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, nær innkomuvegurin til Havnar væntandi verður liðugur?

Viðmerkingar:
Í oktober 2016 gjørdu táverandi borgarstjóri í Tórshavn og táverandi landsstýrismaður í samferðslumálum eina avtalu um innkomuvegin til Havnar. Við hesi avtalu var komið á mál við einum áralongum stríði um, hvussu vegurin skuldi leggjast, hvussu nógvum íbindingum tørvur er á, og hvussu hesar skulu liggja, fyri at gera ferðsluna til Havnar og úr Havnini so smidliga sum gjørligt.

Innkomuvegurin, ið avtala er gjørd um, byrjar við Skarðshjalla og gongur umvegis nýggja rundkoyring við Hvítanesvegin oman fyri munnan til Eysturoyartunnilin norður um Havnina og til Oyggjarvegin.

Partarnir avtalaðu tá, hvørjum vegastrekkjum, íbindingum og flættingum, ið ávikavist landið og kommunan varða av, og grót frá undirsjóvartunlinum skuldi í størst møguligan mun verða nýtt til vegagerðirnar. Avtalað var eisini, at landið og Tórshavnar kommuna skuldu fíggja tunnilin helvt um helvt, og at tunnilin skuldi verða landsvegur.

Nú umboð fyri Fólkaflokkin sita bæði í borgarstjórasessinum í Tórhavnar kommunu og í landsstýrissessinum við samferðslumálum, skuldi tað verið lagamanni at fingið eina avtalu í dag. Tí fari eg at heita á landsstýrismannin um at greiða frá, hvørjar ætlanir hann hevur fyri at fáa vegin gjørdan.

Á Løgtingi, 12. november 2019

Heðin Mortensen